## Annika á umhvørvisfundi

Veðurlagsmál var aðalevnið á norðurlendskum fundi hjá umhvørvisráðharrunum í Helsinki í gjár. Ráðharrarnir vóru á einum máli um, at íkomna fíggjarkreppan ikki skal brúkast sum undanførsla í stóru avbjóðingunum, sum standa fyri framman at minka um útlátið av $CO_2$. Eisini vóru ráðharrarnir samdir um, at arbeiðast skal miðvíst við at fáa eina avtalu um minking í $CO_2$-útlátinum í Keypmannahavn á heysti 2009, hóast fleiri lond tykjast at vilja slaka orsaka av fíggjarkreppuni. Annika Olsen, landsstýriskvinna í umhvørvismálum, greiddi á fundinum sínum starvsfeløgum frá arbeiðinum at gera eina virkisætlan til minking av $CO_2$-útlátinum í Føroyum, sum hon vórar at fáa breiða politiska semju fyri. Sum eitt stig á leiðini hevur tað eydnast at rudda slóð fyri, at eisini umboð fyri Løgtingið kunnu luttaka á komandi partsfundum undir veðurlagssáttmálanum í ávikavist Poznan í Polen í desember og í Keypmannahavn næsta ár, skrivar Innlendismálaráðið.



# Nýggj bók um føroyskan kommunupolitikk

**Kommunupolitisk umboðan í Føroyum er á breddanum í nýggjari bók, sum kemur út í dag**

BÓKAÚTGÁVA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nú tað stundar til kommunuval, bjóðar Forlagið Fróðskapur eitt fínt høvi at síggja alla kommunuskipanina í einum størri høpi við nýggju bókini *Kommunupolitikkur*.

Bókin kemur út í dag, og í sambandi við útgávuna verður almenn móttøka klokkan 15 á Søgu- og samfelagsdeildini í Jónas Broncksgøtu 25, 4. hædd.

Bókin er úrslit av verkætlan millum høvundarnar og byggir í stóran mun á nýinnsavnað tilfar, til dømis dátubasu yvir uppstillað og vald, spurnakanningar millum tey uppstillaðu til kommunuvalini 2000 og 2004, samrøður við politikarar og embætisfólk í kommunala sektorinum, og samrøður við limir í teimum trettan staðbundnu nevndunum. Granskingarráðið gav verkætlanini stuðul í 2006 og 2007, og Søgu- og samfelagsdeildin á Fróðskaparsetri Føroya hevur staðið fyri fyrisitingarliga partinum.



*Bókin »Kommunupolitikkur« byggir í stóran mun á nýinnsavnað tilfar, spurnarkanningar millum valevni og samrøður við umboð í kommunala sektorinum*

### Kommunupolitisk umboðan

Nýggja bókin viðger ymiskar spurningar í samband við kommunupolitiska umboðan í Føroyum. Kommunur eru bæði stovnar, sum umboða lokala fólkaræðið, og fyrisitingarligar eindir, sum eru undirlagdar ein sentralan myndugleika. Víst verður á ymisk søgulig og ástøðilig rák um, hvat ið hevur verið hildið at vera rætta stødd á kommunum. Eisini verður komið inn á spurningin um nýtt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur og nýggjan kommunubygnað. Broytingarnar, sum komu við nýggju kommunustýrislógini í 2000, verða neyvt lýstar. Eitt av evnunum, ið eisini fáa serliga umrøðu, eru staðbundnar nevndir, har millum annað verður lýst, hvat lógargrundarlagið er fyri teimum, og hvussu tær ymisku nevndirnar arbeiða.

At enda í bókini verður hugt at tølum frá dátubasuni og spurnakanningunum millum uppstillað til kommunuvalini: Hvussu eru val til býráð og bygdaráð skipað, hvat slag av listum eru í ymiskum kommunum, og hvussu nógv verða uppafturstillað og afturvald? Hvussu væl umboða tey uppstillaðu og valdu ymiskar bólkar? Fokus verður eitt nú sett á undirumboðanina av kvinnum í kommunupolitiskum høpi, og hvussu roynt hevur verið at betra kvinnuumboðanina.

### Styrkja medvit

Frá forlagnum verður sagt, at ætlanin við bókini er at styrkja medvit um og áhuga fyri lokala fólkaræðinum í Føroyum. Tær avgerðir, ið nú verða tiknar um at broyta galdandi kommunuskipan, eru størstu yvirskipaðu átøkini síðan 1872 at mynda kommunupolitikkin. Reyði tráðurin í bókini bók er, um hesar broytingar fara at bera við sær eina víðkan ella eina skerjan av politiska valdinum og fólkaræðinum í lokalsamfeløgunum.

Beinta í Jákupsstovu, lektari á Søgu- og samfelagsdeildini, Fróðskaparsetur Føroya hevur ritstjórnað bókina. Hini, sum skrivað hava, eru Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóri í Tórshavnar kommunu, Bjørg Jacobsen, nevndarskrivari, og Bárður Larsen, løgfrøðiligur ráðgevi í KSF.

Umframt høvundarnar hevur granskarin Eli Kjersem við Høgskolen i Molde luttikið í verkætlanini, og fyribils úrslit hava verið umrødd á norðurlendskum kommunugranskingarstevn um.

Tað er Forlagið Fróðskapur sum gevur út bókina, sum er 200 blaðsíður. Ingi Joensen/Grafik Studio hevur gjørt permuna.

## Krimirøðin um Hannis Martinsson heldur fram

**Ein gátufør beinagrind er hesuferð orsøkin til, at detektivurin Hannis Martinsson verður fløktur inn í eitt óhugnaligt mál í nýggjari krimisøgu frá Jógvani Isaksen**



*Væl umtókti føroyski detektivurin Hannis Martinsson er aftur á ferð í nýggju krimibókini »Metusalem«, sum kemur út í næstum*

BÓKAÚTGÁVA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Um stutta tíð kemur fimta krimisøgan um Hannis Martinsson eftir Jógvan Isaksen út. Heitið á bókini er *Metusalem*, og sipar tað til eina beinagrind, sum verður funnin í Hoyvíkstjørn. Menn meta leivdirnar at vera um túsund ára gamlar, men ein sandingur sigur, at beinagrindin er av beiggja sínum, sum hvarv í 1961. Frá hesum degi verður Hannis Martinsson fløktur inn í eina røð av hendingum, sum hava træðrir aftur til skotska trolaran »Red Crusader« og hernaðarstøðina í Mjørkadali

### Týskur áhugi

Í Týsklandi er stórur áhugi fyri bókunum hjá Jógvan Isaksen, og 1. november skal hann til týska býin Dortmund at siga frá krimisøgum sínum. Størsta krimitiltak í Europa, "Mord am Hellweg" hevur tá Nordische Nacht, har umframt føroyska høvundan eisini danin Leif Davidsen og svenska Lisa Marklund skulu undirhalda. Úr Týsklandi verður sagt, at alt longu er útselt til hetta kvøldið.

Hetta er annars ikki fyrstu ferð, Jógvan Isaksen er boðin til Týsklands at tosa um sínar krimisøgur. Eisini í 2006 luttók føroyski krimihøvundurin á Nordische Nacht - ta ferðina saman við svensku Camillu Läckberg og íslendinginum Viktor Arnar Ingólfssoni.

# Mótaklæði úr skinni í Smiðjuni

**Jakkar úr kópaskinni og anorakkar úr revaskinni er nakað av tí, ið verður at síggja á framsýning hjá sniðgevanum Rannvu Simonsen í Smiðjuni í Lítluvík um vikuskiftið**

FRAMSÝNING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Komandi vikuskifti sýnir sniðgevin Rannvá Simonsen fram síni sermerktu pløgg úr skinni fyri fyrstu ferð í Føroyum.

Framsýningin letur upp leygardagin klokkan 10 í Smiðjuni í Lítlivík, har høvi millum annað verður at síggja jakkar úr kópaskinni og anorakkar úr revaskinni.

### Hátíðarhalda veturin

- Eg var troytt av at síggja út sum ein sekkur fyri at halda hitanum um veturin, sigur Rannvá Simonsen á síni heimasíðu, um orsøkina til, at hon fór undir at sniðgeva mótaklæði úr skinni.

Føroyska Rannvá Simonsen býr nevniliga í bítandi kalda norður Kanada, har siðurin at gera klæðir úr skinni eisini gav henni íblástur til nýggju sniðini.

Heldur enn at berjst móti kuldanum, sum vanlig hópframleidd vetrarklæði gera, hátíðarhalda upprunaligu skinnklæðini veturin. Og tað var júst hetta, sum Rannvá valdi at gera til eyðkennið fyri sína klædnarøð.

Klæðini útstrála vakurleika og gleði, eru gjørd úr ektaðum skinni og hava ofta áseymaðar blómur eins og fyri at draga eitt sindur av hita úr minninum um summarið.

Øll skinnini, sum Rannvá Simonsen brúkar, eru av djórum, sum eru veidd á burðardyggan hátt. Klædnarøðin umfatar millum annað jakkar, anorakkar, taskur, vøttir og húgvir. Eisini átekur føroyski sniðgevin í Kanada sær bílagdar uppgávur frá viðskiftafólkum kring allan heimin.

Framsýningin í Smiðjuni í Lítluvík er opin leygardagin frá klokkan 10 til 20, sunnudagin 14 til 20 og mánadagin frá 10 til 20.

*Sermerktu skinnpløggini hjá Rannvu Simonsen hátíðarhalda veturin heldur enn berjast móti kuldanum*

